

## Elektronisk sjókort

Danskir og grønlendskir myndugleikar skrivaðu um vikuskifti undir eina avtalu um at gera fleiri elektronisk sjókort av teimum týdningarmestu sjóleiðunum við Vesturgrønland. Tað vóru landsstýrismaðurin í samferðslumálum, Jens B. Frederiksen, og umhvørvismálaráðharrin, Troels Lund Poulsen, sum skrivaðu undir avtaluna. Tey elektronisku sjókortini koma ístaðin fyri verandi sjókort, sum eru ov gomul, og sum ikki kunnu brúkast til núrímans GPS-navigatión, skrivar KNR. Danska umhvørvismálaráðið hevur játtað 10 milliónir krónur til tey elektronisku sjókortini.

## Seta ferðina niður

Í Svøríki hava myndugleikarnir samtykt at seta hámarksferðina á nógvum vegateinum kring landið niður. Broytingin, sum kemur í gildi tann 10. november, verður millum annað, at á teimum flestu vegateinunum, sum nú hava 90 kilometrar sum hámarksferð, verður mest loyvda ferðin nú 80 kilometrar um tíman. Stjórin í svenska vegverkinum, Lena Eeixon, sigur við tíðindastovuna ANB, at endamálið við at seta ferðina niður er at bjarga mannalívum. Men ferðin verður eisini lagað eftir umstøðunum, og tí verður hámarksferðin sett upp á nøkrum vegateinum, har tað verður hildið vera ráðiligt.

# Taks flytast úr Havn til Saltangará

**Ætlanin hjá Jóannesi Eidesgaard um at flyta Taks úr Saltangará til Klaksvíkar, hevur nú í dag tikið eina spildurnýggja og heldur óvæntaða vend**

ALMENN STØRV

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Eg taki ikki undir við ætlanini, at flyta Taks úr Saltangará til Havnar. Ístaðin fyri eigur Taks í Havn at flytast til Saltanará.

Tað staðfestir Alfred Olsen, formaður Sambandsfloksins á tingi.

Tað kom ordiligur røringur í, tá ið vit í Sosialurin fríggjadagin greiddi frá eini ætlan hjá Jóannesi Eidesgaard, landsstýrismanni í fíggjarmálum um at lata deildina hjá Taks í Saltangará aftur og flyta hana til Klaksvíkar.

Eini 20 fólk arbeiða hjá Taks í Saltangará og ætlanin hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum er at rationalisera alt norðurøkið hjá Taks í eini felags umsiting í Klaksvík.

Hetta hevur elvt til órógv hjá politikarum rundan um Skálafjørð og tað er í øllum førum greitt, at Jóannes Eidesgaard skal brynja seg til politiskan bardaga fyri at fáa hesa ætlanina ígjøgnum.

Tað eru nevniliga ikki allir tinglimir í samgonguni, sum taka undir við ætlanini.

Ein av teimum er Alfred Olsen, sum heldur, at tað er undarligt at frætta um eina slíka ætlan í Sosialinum.

- Hetta kemur óvart á meg tí málið er ikki viðgjørt í samgonguni yvirhøvur og tað er heldur ikki viðgjørt í landsstýrinum.

Og formaðurin fyri Sambandsflokkin á tingi ger púra greitt, at hann er ímóti ætlanini.

Men um Sambandsflokkurin beinleiðis fer at blokera fyri ætlanini í samgonguni, dugir hann kortini ikki at siga í løtuni, tí flokkurin hevur ikki tosað um málið.

### Flyta Taks úr Havn

Hinvegin dugir Alfred Olsen væl at síggja fyrimunirnar í at samansjóða umsitingina hjá Taks fyri at rationalisera.

Men í hesum sambandi gevur hann málinum eina heilt nýggja vend.

- Skal Taks samskipast er tað ikki rætt at flyta deildina í Saltangará til Klaksvíkar. Tað einasta rætta er at flyta Taks úr Havnini og úr Klaksvík til Saltangará og skipa allan stovnin í eini felags umsiting í miðdeplinum í Eysturoynni.

- Tá ið Eysturoyartunnilin er komin um nøkur fá ár, verða tað bara nakrir heilt fáir minuttir úr Havn inn til Saltangará, so her liggur stovnurin sera væl fyri, heldur Alfred Olsen.

Hann sigur, at skulu broytingar gerast á Taks, er tað als ikki óhugsandi, at hetta verður kravið frá Sambandsflokkinum

### Ódámlig samanblanding

Kortini heldur Alfred Olsen, at spurningurin um at gera broytingar í Taks, hevur ódámliga snaring.

- Tað hevur fyrr verðið tosað um at leggja Taks í Saltangará og Klaksvík saman í ein stovn fyri at rationalisera. Men nú eru ábendingar um, at tað endamálið er farið aftur um og at talan nú er um eitt samanspæl ímillum Javnaðarflokkin og Klaksvíkar Býráð og at endamálið líka nógv er at lyfta Klaksvíkar Kommunu burtur úr eini fíggjarligari knípu, tí hví skal landsstýrið annars keypa býráðshúsið frá Klaksvíkar Kommunu.




*Púra ósjálvboðið er Taks blivin miðdepilin í einum lokalpolitiskum dysti, sum byrjaði í sosialinum frígjadagin, tá ið Jóannes Eidesgaard greiddi frá at hann arbeiddi við møguleikanum at flyta Taks í Runavík til Klaksvíkar. Í dag tekur málið eina heilt nýggja end, nú Alfred Olsen mælir til at flyta Taks úr Havn og úr Klaksvík og at gera eitt høvuðssæti í Eysturoy*

# Jóannes Eidesgaard biður um rumbul

**- Soleiðis ber ikki til at bera seg sigur Jógvan á Lakjuni, løgtingsmaður**

ALMENN STØRV

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Eg fari slett ikki at góðtaka, at Taks verður flutt úr Saltangará til Klaksvíkar, bara tí at Javnaðarflokkurin sigur tað.

Jógvan á Lakjuni, løgtingsmaður fyri Fólkaflokkin, er ørkymlaður av tíðindunum í Sosialinum fríggjadagin um at Taks í Eysturoy skal flytast til Klaksvíkar.

Hann staðfestir, at hetta er ikki viðgjørt í samgonguni og tað fer hann at krevja at tað verður.

- Tá ið Jóannes Eidesgaard kemur við eini fráboðan sum hesari, er hetta tað sama sum at biðja um rumbul í samgonguni, tí soleiðis kann hann ikki fara fram, sigur løgtingsmaðurin.

### Skilir ikki Javnaðarflokkin

Hann skilir ikki hvat tað er, sum fyriferst í Javnaðarflokkinum.

- Fyrst kunngerð ein landsstýrismaður hjá flokkinum, Aksel V. Johannesen, at klaksvíkingar eiga tørn at fáa ein almennan stovn og tí hevði hann gjørt av at leggja nýggju Heilsutrygdina í Klaksvík.

- Nakrar tímar seinni kallar Gerhard Lognberg hetta fyri bakbit, tí tað var avtalað í samgonguni, at stovnurin skuldi vera í Sandoy.

- Og nakrar dagar seinni kunngerð ein annar landsstýrismaður hjá flokkinum, Jóannes Eidesgaard, at nú skal Taks í Saltangará flytast til Klaksvíkar.

Jógvan á Lakjuni staðfestir, at hann kennir onki til nakra avtalu í samgonguni um, hvar almennir stovnar skulu vera, heldur ikki, hvat Heilsutrygd skuldi vera.

- Um nøkur avtala gjørd í Javnaðarflokkinum, veit eg ikki, leggur hann afturat.

### Neyðrakettir

Hann sigur, at hann veit ikki, hvat endamálið hjá Javnaðarflokkinum er.

Tað kann sjálvandi vera ein roynd at gera vart við seg.

Hann heldur, at tað sær út til at Javnaðarflokkurin hevur fingið ein bráðkomnan tørv á at senda eina neyðrakett fyri og aðra eftir upp í loft eftir vanlukkuligu veljarakanningini í summar.

- Men soleiðis ber ikki til at arbeiða í eini samgongu, tí slík mál skulu avtalast í samgonguni fyrst, sigur Jógvan á Lakjuni.

- Slík framferð kann bara enda við einum og tað er, at onki hendir.

- Eg veit ikki, hvør eigur tørn til almenn arbeiðspláss, men tað eru í øllum førum nógv fleiri almenn arbeiðspláss í Norðoyggjum, enn tað eru í Eysturoy, leggur hann afturat.

- Tí fari eg ikki at góðtaka, at almenn arbeiðspláss verða flutt úr Eysturoy.

Og hann sigur, at skal raksturin rationaliserast, kundi tað verið eitt hugskot at savna alt Taks á einum staði, kanska í Eysturoynni, sigur Jógvan á Lakjuni.